# **Skotland** – ferðamál fyri barnafamiljur

**Í summar** fer Norrøna aftur at sigla millum Føroyar og Skotland. Norrøna leggur leiðina til Scrabster hvønn mánadag frá 16. juni til 25. august og úr Scrabster til Tórshavn hvønn mikudag frá 18. juni til 27. august.

Smyril Line fegnast um, at tey nú hava eina fasta ferðaætlan til Skotland í summar, og hetta hevur longu nú ført við sær fleiri bókingar.



### Skotskir dagar í SMS 24.-26. apríl

Í hesum døgunum hevur Smyril Line ein stóran bás á torginum í SMS. Eisini Sue McCulloch frá VisitScotland er við á básinum. Hon hevur nógvar áhugaverdar faldarar við úr Skotlandi og fer at greiða frá øllum upplivingarmøguleikum, sum eru í Skotlandi.

Á básinum fer sekkjapípuspælarin John at spæla fleiri ferðir um dagin. John hevur ferðast kring allan heimin við VisitScotland og hevur m.a. spælt í New York.

Bamsan Nessie er eisini komin ein túr til Føroyar, og hon fer at ganga runt í SMS og heilsa upp á børnini.

### Kappingar, vinningar og góð kampingtilboð

Á básinum verða eisini kappingar, har øll kunnu vera við. Hvønn dag verður drigið um ein bilpakka fyri 4 fólk Tórshavn-Scrabster fram og aftur. Eisini verður møguleiki at royna seg við golf-spæli, og á lítla putting-vøllinum kanst tú vinna cruiseferð Tórshavn-Bergen-Scrabster.

Stubbin.fo er eisini á básinum, og í tí sambandinum hevur Smyril Line eitt fantastiskt tilboð til Skotland við kampingvogni til allar limir í camping.fo.

### Fyrilestur um Skotland á Baresso

Hóskvøldið 24. apríl kl 20 verður fyrilestur um Skotland á Baresso. Tiltakið er ókeypis. Okkurt lætt verður til matna og so kann ein keypa okkurt at drekka afturvið.

Sue McCulloch fer fyrst at hava eina framløgu um Skotland, og aftaná fer Jørleif Kúrberg at siga frá hansara ferðum í Skotlandi.

### Flaggdagin á Vaglinum í Havn

Flaggdagin 25. apríl letur SMS aftur kl. 12, og tá fara Smyril Line, VisitScotland, Nessie og sekkjapípuspælarin ein túr oman á Vaglið í Havn í samband við flaggdagshaldið.

Tey vera í einum telti undir Eik-bygninginum við gongugøtuna frá umleið kl. 13.30 til kl. 17. Sekkjapípuspælarin fer at spæla, og Nessie fer at ganga sær ein túr í Miðbýnum.

### SMS er opið til kl. 19 leygardagin 26. apríl

Frítt verður at koyra gjøgnum tunlarnar leygardagin 26. apríl, og tí er SMS opið til kl. 19. Tá verða Smyril Line og hini sjálvandi á torginum allan dagin.

- Vit gleða okkum at síggja tykkum 24., 25. og 26. apríl á torginum í SMS, siga tey á Smyril Line.

# Nairn var yndisbletturin hjá **Charles Chaplin**

**Víðagitni skemtarin Charles Chaplin vitjaði regluliga í Nairn**

**Nairn** verður nevndur "The Charles Chaplin capital of Scotland" – Charles Chaplin høvuðsstaðurin í Skotlandi. Hagfrøðisliga er Nairn tann býurin í Skotlandi har tað regnar minst, sjálvt um býurin liggur beint við Norðsjógvin. Hetta kemur av, at Golfstreymurin gongur framvið havleiðunum við Nairn. Býurin er ikki stórur í bretskum málistokki, bert 8.418 fólk búgva í norðurskotska strandabýnum, men tað sum býurin ikki hevur í íbúgvaratali, tað megnar økið við Nairn at geva við vakrari náttúru og fáum regntímum. Býurin hevur eisini tveir golfvallir, eina langa strandarpromenadu, ein vakran katedral, svimjihyl og annað áhugavert til ferðamannin. Millum Jazzfjepparar er Nairn eisini heimskendur fyri sín árliga Jazz-festival. 8 kilometrar frá Nairn er tann tiltikna vakra borgin Cawdor Castle, sum hevur ein framúr vakran urtagarð. Men fyri føroyingar er tað uttan iva tann stóra strondin, sum er best kend. Har hevur mong ein føroysk familja búleikast í einari karavan (føstum húsvogni).

### Hvørt summar

Tann víðagitni skemtarin, tónlistamaðurin og filmsframleiðarin, Charles Chaplin, sum livdi árini 1889-1977 treivst so væl í Nairn, at hann kom aftur og aftur á vitjan. Chaplin, sum fekk sítt filmsgjøgnumbrot í 1913 var giftur fleiri ferðir, og átti nógv børn. Men upp gjøgnum árini gav heimskenda landastrokið sær altíð tíð til at vitja í Nairn, saman við teimum ymsu konunum, sum hann var giftur við gjøgnum árini. Einki summar fór framvið, uttan at Chaplin vitjaði í Nairn. Íbúgvarnir í Nairn eru ovurstoltir av hesum, og tað er sjálvsagt, at teir bera tað fram, tá teir royna at selja býin, sum ferðamál. Gistingarhúsini og matstovurnar í Nairn hava rættiliga ofta støð, sum bera brá av, ella eru nevnd eftir Chaplin. T.d. hevur Newton Hotel eina "Chaplin Restaurant". Eingin, sum vitjar Nairn, verður ósamdur við Chaplin í, at býurin og økið har um leiðir er vert eina vitjan.



*Charles Chaplin (1889-1977) vitjaði ofta í Nairn, sum var yndisblettur hansara*